## Jyllands-Posten fríkendur

Í dag varð blaðið Jyllands-Posten fríkent fyri ærumeiðing og útspilling í samband við Muhammed-tekningarnar. Hetta staðfesti býrætturin í Århus á einum rættarfundi.

Teir, sum stevndu Jyllands-Posten vóru Islamisk Trosamfund og seks aðrir felagsskapir, hava nú stevnt dómin inn fyri landsrættin.

Framsøgumaðurin hjá Islamisk Trosamfund, Kasen Said Ahmad sigur, at rætturin hevur givið Jyllands-Posten rætt til vanhalga muslimarog kenslurnar hjá muslimum, og givið Jyllands-Posten binda muslimar saman við terror.

## Tjóðskaparliga semjan á breddan

Tjóðskaparliga semjan er høvuðsevnið, tá ið umboð fyri Stjórnarskipanarnevndina í kvøld fara at kunna í Klaksvík

Stjórnarskipanarnevndin fer í kvøld klokkan 19.30 at kunna um arbeiðið við at fyrireika uppskot til nýggja stjórnarskipan. Fundurin verður í skúlanum við Ósánna í Klaksvík.

Høvuðsevnið verður uppskoti til semja, sum nevndin arbeiðir við at fáa um tjóðskaparliga spurningin. Eftir framløgurnar verður høvi at seta spurningar.

Málið um samkynd:

# Savna inn undirskriftir

**Útlendski áhugin fyri málinum um viðurskiftini hjá teim samkyndu í Føroyum økist alsamt, og nú er ein donsk heimasíða farin at savna undirskriftir inn, har fólk, sum eru í móti diskriminatión av samkyndum skriva seg á ein lista, sum seinni verður handaður løgtinginum**

SAMKYND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni vísti Sosialurin á, at útlendski áhugin fyri málinum, um viðurskiftini hjá teim samkyndu í Føroyum, er ovurhonds stórur. Danskir, íslendskir, norskir og týskir fjølmiðlar hava viðgjørt málið, og tað hevur skapt øsing fleiri staðni.

Stóra danska blaðið, Politiken, hevði í sunnudagsútgávu síni eina umrøðu av málinum, sum hevur fylgt føroyskar fjølmiðlar seinastu tíðina. Greinin sunnudagin var í stuttum ein samandráttur av øllum tí, sum er hent her, og samstundis byrjanin til eina greinarøð. Í týsdagsblaðnum hevur Politiken eina samrøðu við pápa Rasmus Rasmussen, Mortan Rasmussen, og henda samrøða verður so fylgd upp seinni í vikuni.

### Umheimurin má handla

Men tað er verri enn so bara Politiken, sum hevur málið um tey samkyndu í Føroyum til viðgerðar. Fyri ein tíð síðani tók Nynne Nørup, universitetslesandi, stig til heimasíðuna www.act-against-homophobia.underskrifter.dk, har hon savnar inn undirskriftir frá fólki, sum eru í móti diskriminatión av samkyndum.




*Jørgen Saabye hevur tekna hesa tekning, sum skal lýsa støðuna hjá samkyndum í Føroyum, og er hon at síggja í dagsins útgávu av Politiken.*

Tá blaðið fór til prentingar høvdu ikki færri enn 2600 fólk skrivað seg á listan, sum seinni verður handaður Føroya Løgtingi.

Á heimasíðuni stendur, at málið við innsavningini er at vísa, at umheimurin ikki góðtekur tað slagið av mismuni sum samkynd í Føroym líða undir. "Tað er líkamikið, um tað er í navni kristindómsins ella ikki. Tað eru nakrir borgarar í Føroyum, sum mótmæla, men tað er eisini brúk fyri, at umheimurin ger okkurt", stendur millum annað á lesa á heimasíðuni.

### Anders Fogh harmast

Men tað er ikki bara vanligi danin, sum ógvast og øtast um støðuna í Føroyum. Týsdagin gav danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, sína persónligu meining um málið til kennar á einum tíðindafundi.

– Hatta er eitt mál fyri tað føroyska heimastýri. Formelt skal Danmark als ikki blanda seg, og tað fer Danmark heldur ikki at gera.

– Men eg vil gjarna siga mína politisku viðmerking um tað og tað er, at ógvuliga harmur um tað, eg hoyri og síggi í Føroyum. Eitthvørt samfelag hevur til ábyrgd at tryggja, at tað ikki verður gjørdur mismunur á fólki, sigur Anders Fogh Rasmussen.

# Jólagávu til øll húski frá Føroya Banka

**Í samband við at Føroya Banki fyllir 100 ár í ár, hava Jørn Astrup Hansen og Jóan Pauli Joensen skrivað eina bók um søgu bankans, og sum øll húski í Føroyum borðið í postkassan í desember**

FØROYA BANKI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Jørn Astrup Hansen og Jóan Pauli Joensen hava saman skrivað bókina, sum øll húski fáa í desember.*

Føroya Banki fyllir 100 ár og heldur rimmar føðingardagshald við gallakvøldum um alt landið í hesum døgum. Nógv verður gjørt burtur úr og talan hevur verið um nøkur serstakliga væleydnaði kvøld við skemti, tónleiki, filmi og góðum mati.

Á hesum gallakvøldum hevur bankin eisini boðað frá, at Føroya Banki hevur latið eina bók skrivað um søgu bankans. Tað eru teir báðir Jóan Pauli Joensen, professari og rektari á Fróðskaparsetri Føroya, og Jørn Astrup Hansen, fyrrverandi stjóri í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, sum hava skrivað bókina.

Bókin er í tveimum bindum. Fyrra bindið er um søgu bankans, og henda partin hevur Jørn Astrup Hansen skrivað. Seinna bindið er um samfelagsmenningina í Føroyum hesi árini føroyingar hava havt bankar, og henda partin hevur Jóan Pauli Joensen skrivað.

Um bókina kann sigast, at hon er áhugaverd á so nógvar ymsar mátar. Millum annað verður farið nágreiniliga ígjøgnum bankakreppurnar í bæði fimmti- og nítiárunum.

Har verður onki pakka inn og veruleikin verður lýstur so bersøgin, sum hann nú einaferð kann, tá tað er Jørn Astrup Hansen, ið skrivar.

### Til hvørt húski

Føroya Banki ætlar, at bókin skal sendast øllum húskjum í Føroyum, og einaferð í fyrru helvt av desembermánaði kunnu føroyingar rokna við, at bókin um Føroya Banka liggur í teirra postkassa. Í so máta ber til at siga, at allir føroyingar fáa eina føðingardagsgávu og jólagávu frá bankanum í desember.

Annars er tað ikki fyrstu ferð, at føroyingar fáa eina ókeypis bók frá bankunum. Í 1982, tá Sjóvinnubankin fylti fimmti, lat bankin eisini øllum húskjum í Føroyum eina bók um bankan, men nú kunnu føroyingar so aftur gleðast um, at fáa eina bók um bankasøgu ókeypis.